

www.oljan.fo

**Jan Müller** 02 - 11 - 2011

# Nú kemur Barentshavið undan kavi

Síðani avtalan millum Noreg og Russland um býtislinjuna í Barentshavinum kom í gildi í summar, hevur tað almenna kortverkið í Noregi kannað ein part av botninum eysturi í tí økinum, sum norðmenn kalla Barentshavet Sør. Hetta er fyrstu ferð, at slíkar botnkanningar eru gjørdar har, og úrslitið kann fáa týdning fyri leitingina eftir olju og gassi í umráðnum. Hanne Hodnesdal, sum stendur fyri arbeiðinum hjá kortverkinum, sigur við Stavanger Aftenblad, at tey hava sæð fleiri sokallað pockmarks, ið eru støð, har gass kemur upp úr havbotninum. Hon ger tó vart við, at tey vita ikki, um gassið streymar upp úr botninum nú, ella um tað hevur sín uppruna ovarlaga ella niðarlaga í løðunum undir botninum. Reidar Bøe, sum er jarðfrøðingur hjá Norges geologiske undersøkelse, sigur, at pockmarks er einki prógv fyri, at olja ella gass eru niðri undir havbotninum, og tann spurningurin verður ikki svaraður, fyrr enn oljustýrið kemur við sínum kanningarúrsliti, sigur hann. Oljustýrið hevur gjørt seismiskar kanningar í økinum, men úrslitið kemur ikki fyrr enn í fyrsta lagi næsta ár. Síðani síðst í august hava norskir myndugleikar gjørt dýpdarmátingar á markinum ímóti russiskum sjóøki. Talan er um eitt 8.500 ferkilometrar stórt øki, og tá kortfólkini hava fingið sítt burtur úr tilfarinum, verður tað latið jarðfrøðingunum og fiskifrøðingunum. Hanne Hodnesdal sigur, at nógvastaðni er tann norski havbotnurin ikki nóg væl kannaður, og at tað er neyðugt at fáa størri vitan um botnin og viðurskiftini har, áðrenn tað ber til at taka støðu til, um leiðirnar skulu brúkast til olju, fisk ella annað. Tí hava upplýsingarnar um botnin eisini stóran týdning fyri politikararnar.